SOSIALURIN

Úr býráðnum:

Býráðið samtykt at keypa skúlainnbúgv til 2. hædd í kommunuskúlanum

Á eykabýráðsfundi seinasta mikudag kl. 14.00 vóru allir limir á fundi. Áðrenn formaðurin setti fundin bað hann býráðið um loyvi at taka trý mál uttanfyri dagskránna. Síðani setti formaðurin fundin við at lesa dagsskránna upp:

Tilráðing frá kassanevndini

Mál viðv. keyp av skúlaborðum og stólum til 2. hædd við kommunuskúlan 150 einkultborð og tilhoyrandi stólum.

Innkomin eru tvey tilboð:

Nýggi Bókhandil kr. 52.850.

Innbúgv kr. 48.400.

Skúlanevndin hevur samtykt — eftir ynski frá lærarunum — at mæla býráðnum til at taka við tilboðnum frá Nýggja Bókhandli, og vísir til konto nr. 24-20 í figgjarætlan kommununnar fyri 1972/73.

Málið hevur verið fyri á býráðnum hin 21. juni 1972 og varð beint í kassanevndina til nærri kanningar.

Ein minniluti í nevndini, Hanus við Høgadalsá og Sofus Sivertsen, mælir býráðnum til at samtykkja tilráðingina frá skúlanevndini. Ein annar minniluti, Petur Christiansen, mælir býráðnum til at samtykkja tilráðingina frá skúlanevndini, tí tíðin er knøpp og borðini skulu nýtast 18. august 1972, men ynskir kortini at brøvini frá skúlanevndini til tilboðsgevararnar vera tøk á býráðsfundinum.

Ein triði minniluti, Petur í Gong, mælir býráðnum til at taka við lægsta tilboði, tí tilboðsinnheintingin má skiljast sum bundin licitatión.

Á seinasta býráðsfundi var hetta málið fyri, men var tað tá beint aftur í nevnd. Nú tá ið tað er komið fyri aftur býráðið, er tað býtt upp í tríggjar áskoðanir.

Drúgt kjak stóðst av hesum máli, m. a. vísti Petur í Gong á, at sum tað nú var vorðið í hesum máli, hevði skúlanevndin brotið reglurnar fyri bundna licitatión. Hann mælti til, at taka við tí lægra tilboðnum.

Ólavur Michelsen vísti á, at borðini, sum Nýggi Bókhandil bjóðaði uppá vóru betur egnað og større til tað ætlaða endamálið.

Tjakast var so aftur og fram um málið í eina góða løtu.

Petur Christiansen boðaði frá, at hann vildi taka sítt minnilutauppskot aftur.

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni kom at siggja soleiðis út: Uppskotið frá skúlanevndini fekk seks atkvøður fyri og 5 ímóti. tað var sostatt samtykt, meðan uppskotið hjá Petur í Gong datt burtur.

Tilráðingar frá býarplánsnevndi

Umsókn frá Snorra Dam Jacobsen um byggiloyvi til eini sethús á matr. nr. 1098 c.

Nevndin samdist um at mæla býráðnum til at samtykkja, at umsóknin fær viðmæli treytað av, at takreisingin verður saðiltak.

Samtykt við 11 atkv.

Umsókn frá Eyðbjørn Hansen um loyvi kann væntast givð til bilverkstað í tilbygninginum í húsinum hjá Dánjali Danielsen, matr. nr. 1340.

Nevndin samdist um at mæla býráðnum til at samtykkja, at umsóknin fær viðmæli treytað av, at eingir bilar verða parkeraðir á Varðagøtu ella á økinum millum verandi hús og Varðagøtu, at oljuuppsamlari verður gjørdur, og at loyvi til umbyggingina má fáast frá bygginevndini.

Samtykt við 10 atkv. fyri og 1 ímóti.

Umsókn frá Leivi Lützen fyri Bjartur og Bjørg í Dali um loyvi at broyta placeringina av húsinum, ið ætlast bygd á matr. nr. 699 l við Klokkaragøtu.

Nevndin samdist um at mæla býráðnum til at samtykkja, at umsóknin fær viðmæli treytað av, at húsini verða sett minst 2,5 m frá suðurmarkinum.

Samtykt við 11 atkv.

Mál viðv. bygging av verkstað og servicustoð við Oyggjarvegin hjá Martini Dam Jacobsen.

Nevndin samdist um at mæla býráðnum til at samtykkja, at umsóknin fær viðmæli treytað av.

1. at treytirnar frá landsverkfrøðinginum frá 8. juni 1972 verða hildnar,
2. at treytirnar frá nátúrfriðingarnevndini frá 4. november 1971 verða hildnar,
3. at kommunan ikki átekur sær skyldu viðv. vatnveiting til bygningin,
4. at kommunan tekur onga ábyrgd fyri ampa av einum hvørjum slagi, sum standast av arbeiðinum í grótbrotinum,
5. at kloakkin verður veitt út í nærmastu høvuðskloakk. Áðrenn byggingin fer fram skal projekt av kloakkini sendast til býarverkfrøðingin til góðkenningar,
6. at oljusamlari verður gjørdur, og
7. at verandi verkstaður í J. Dahlsgøtu verður niðurlagdur.

Til stk. 7 mælti Ólavur til, at broyta soleiðis, at í staðin fyri tað sum nú stóð skuldi standa: Býráðið heitir á Martin Dam Jacobsen um at leggja verkstað sítt J. Dahlsgøtu niður.

Atkvøtt var fyrst um stk. 1, 2, 3, 4, 5 og og vóru tey samtykt við 11 atkv.

Broytingaruppskotið hjá Ólavi Michelsen um stk. 7 fekk seks atkv. fyri og tvær ímóti og var sostatt samtykt.

ÓLAVUR MICHELSEN ATKVODDI IKKI FYRI AT »BLAÐSTARV« SKULDI FÁA BYGGILOYVI

Umsókn frá D. P. Danielsen fyri pf. Blaðstarv um byggigrund til ídnaðarendamál.

Nevndin samdist um at mæla býráðnum til at samtykkja, at pf. Blaðstarv fær tað á hjálagda korti vísta øki til nevnda endamál.

Spurningurin um keypspris ella leigu verður at avgera av kassanevndini.

Hetta málið fekk 9—0 atkvøður. Kjartan Mohr og sjálvur Ólavur Michelsen blað-


Framhald á 7. síðu. (1)

TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI

TIVOLI

hevur opið hvønn dag: mánadag til fríggjadag frá kl. 19.00—23.00, leygardag og sunnudag frá kl. 17.00—23.00.

KARUSSEL — EYDNUHJÓL — TOMBOLA — POINTJAGT — SEYMSLÁING — SKJÓTIBANI o. a.



Stórir lutir verða drignir hvørt leygarkvøld og sunnukvøld. Atgongumerki á 1 kr. er lutaseðil. — Drigið verður kl. 23.00.

Útsøla av: ÍSI — SODAVATNI — ØLI — PYLSUM — BALLÓNUM o. ø.

TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI — TIVOLI